Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	1. november 2023
Mál nr.:	23/17972
Málsviðgjørt:	KÁ/JEB
Ummælistíð:	9. oktober til 17. oktober 2023
Eftirkannað:	11. oktober 2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagføring av vardum bústøðum
(Hækka játtan og leingja sólseturáseting)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 85 frá 7. juni 2020 um dagføring av vardum bústøðum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður "33 mió. kr." broytt til: "41,5 mió. kr.".

2. Í § 2 verður "31. desember 2023" broytt til: "31. desember 2027".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Í 2020 samtykti Løgtingið løgtingslóg um dagføring av vardum bústøðum. Í viðmerkingum til lógaruppskotið varð sagt, at endamálið við uppskotinum er at bøta munandi um umstøðurnar á verandi bústovnum samstundis sum, um alt gekk sambært ætlan, fóru umleið 25 nýggj búpláss at verða útvegað.

Síðani lógin varð samtykt er væl fingið burtur úr havandi í huga, at prísirnir eru munandi hækkaðir, eftir at lógin varð samtykt. Hetta hevur verið ein stór avbjóðing í sambandi við metta umvælingarkostnaðin og útinnanina av dagføringunum.

Eftir at lógin kom í gildi, er frágreiðingin "Í góðum hondum" gjørd. Her verður mælt til at byggja størri bústovnar, og millum annað av hesi orsøk, varð upprunaliga ætlanin endurskoðað, og gjørt varð av, at heldur enn at dagføra nakrar av verandi bústovnum, ið vóru smáir og óhóskandi, verða hesir niðurlagdir, so hvørt nýggir stovnar verða bygdir. Til samans eru 9 nýggj búpláss útvegað ella um at verða útvegað, samstundis sum fleiri av verandi bústovnum eru dagførdir í mun til brunakrøv, atkomu, ljóð, ljós, ventilatión o.a.

Tað er framhaldandi tørvur á at dagføra nakrar av verandi bústovnum, sum ikki vórðu tiknir við í raðfestingina í fyrsti atløgu, hóast at fleiri búpláss ikki verða útvegað. Tað snýr seg serliga um at betra um brunatrygdina, atkomuviðurskiftini, trygd, orku, inniklima, leggja inn grønar løðarar og møgulig onnur viðurskifti. Við at leggja inn grønar málarar og løðistøðir til el-bilar, verður møguleiki hjá Almannaverkinum at tillaga infrastrukturin soleiðis, at gjørligt verður at leggja um til el-bilar, ístaðin fyri verandi bensin og diesel bilar, sum hevur við sær, at Almannaverkið sum frálíður kann gagnnýta raksturin betur. Harumframt er ætlanin at brúka játtanina til aðrar fyriskipanir heimilaðar í lógini um almannatrygd og tænastur. Talan kann t.d. verða um tænastur eftir sambært §44 um hjálp í sambandi við harðskap.

Hægri játtan er tí neyðug, tí rokkið verður ikki á mál við verandi fíggjarkarmi. Umframt hægri fíggjarkarm er eisini neyðugt at leingja lógina, tí tað vísir seg, at tað kann ganga rúm tíð at fáa arbeiðstakarar og onnur viðurskifti uppá pláss, áðrenn dagføringarnar kunnu fremjast. Almanna- og mentamálaráðið, Almannaverkið og Landsverk arbeiða í løtuni við at ítøkiliggera ætlanirnar. Hetta greiningararbeiðið verður liðugt í næstum.

1.2. Galdandi lóggáva
Løgtingslóg nr. 85 frá 7. juni 2020 um dagføring av vardum bústøðum.

Endamálið við lógini var serliga at herða brunatrygd, at bøta um atkomuviðurskiftir, at bøta um inniklima, harundir sansaligt (ljóð, ljós), termiskt (lufthita, flatukomfort) og atmosferiskt inniklima (luftgóðsku, ventilation), at gera smærri orkuumvælingar, og annars at rætta brek, feilir og óhepnar loysnir á bústovnunum í mun til dagsins aðalkrøv og bygningskunngerðina, umframt at útvega fleiri búpláss.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er framhaldandi at dagføra verandi bústovnar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum at broyta løgtingslógina um at dagføra verandi bústovnar er bæði at leingja sólsetursásetingina við fýra árum og hækka fíggjarkarmin við 8,5 mió. kr. til tess at halda fram við at dagføra verandi bústovnar. Tó verður ætlanin um at útvega fleiri búpláss enn tey, ið longu eru komin ella eru í umbúnað, slept.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Av tí at broytingaruppskotið í mesta lagi snýr seg um at hækka fíggjarligu heimildina, hevur broytingaruppskotið bara verið til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum, Almannaverkinum og Landsverki. Uppskotið er gjørt í samráð við Almannaverkið og Landsverk.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Í 2024 verður fíggjarkarmurin hækkaður við 4,5 mió. kr. og ávikavist 2,0 mió. kr. í 2025 og 2,0 mió. kr. í 2026, so samlaði fíggjarkarmurin hækkar úr 33,0 mió. kr. upp í 41,5 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri land við tað, at lógin ikki fer úr gildi fyrr enn 31. desember 2027.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur við sær økt virksemi fyri byggivinnuna..

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur sum frá líður jaligar avleiðingar fyri umhvørvið, tí Almannaverkið ætlar at leggja inn grønar málarar, løðistøðir til el-bilar, so at infrastrukturin á Almannaverkinum kann tillagast, so at gjørligt verður at leggja um til el-bilar ístaðin fyri verandi bensin og diesel bilar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri fólk, ið búgva í vardum bústøðum. Eitt nú verður betri brunatrygd og betri inniklima.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sambært grein 28 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor og tískil eisini rætt til nóg góðan bústað. Somuleiðis viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, sleppa upp í almenn bústaðartiltøk. Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at liva upp til hesa viðurkendu áseting.

2.9. Markaforðingar
Ongar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýriskvinnuni at nýta upp í 41,5 mió. kr. til at dagføra verandi vardar bústaðir.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Ja	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Ja	Ja	

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Fíggjarkarmurin verður hækkaður úr 33,0 mió. kr. upp í 41,5 mió. kr. til at dagføra verandi bústovnar, og sólseturásetingin er longd.

Til § 2
Talan er um gildiskomuáseting.

Almanna- og mentamálaráðið, 1. november 2023

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringsskriv frá Landsverk
Fylgiskjal 3: Støðuskrá (fíggjarstøða)